# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/15 - 23. mai 2024 18:00-22:30

### Skrá:

1. Bygnaðurin hjá skúlanum.
2. Foreldraumboð frá Gulaskúla í Skúlastýrið á SAF?
3. Uppstillingarfundur
4. Ymiskt
5. Áseta næsta fund

### Møtt á fundi:

| | |
|---|---|
| Møtt: | Regin, Erla, Snorri, Sjúrður & Derhard |
| Forfall: | Bjørg, Súsanna |
| Gestir: | eingin |

### Fundarfrágreiðing

Ad. 1
**Bygnaðurin hjá Skúlanum**
Mál fyri leiðsluna at arbeiða víðari við frá seinasta fundi:
*Skúlastýrið samtykkir at leiðslan arbeiðir víðari við málinum um skúlabygnaðin og skrivið frá kommununi.*
*Um kommunan ynskir at royndarvenjingin og upptøkan í ítróttarrás í 7.fl ikki skal lýsast á heimasíðuni steðgar skúlin hesari mannagongd. Men skúlastýrið ger vart við at hendan mannagongdin er sett íverk eftir ynski frá hinum skúlunum, so tey lata inn rætt næmingatal í januar.*
*Skúlin skal lýsa nýggju mannagongdina fyri skúlastýrinum á næsta fundi.*
*Ítróttarrásin fer kortini framhaldandi at vera frá 7.fl bara við leypandi tilmelding heldur enn í ávísum tíðarskeiði.*
*Hesum tekur skúlastýrið undir við.*

Málið er kveikt í skrivi frá kommununi 24/3 frá Jákupi Foldbo, ið skrivar so:
*Skúlin á Fløtum*
*Regin Marnerson, skúlastjóri*
*Cc Herman Mortensen, trivnaðastjóri og Jóan Petur Hentze, kommunustjóri*

*Avrit av hesum skrivið verður sent leiðslunum á Skúlanum á Argjahamri, Sankta Frans skúla og Eysturskúlanum til kunningar*

*Leiðslan í kommununi hevur viðgjørt støðuna sum er íkomin av at Skúlin á Fløtum hevur bjóðað út breyttilboð til næmingar úr øðrum skúlum, frá 7 flokki komandi skúlaár 2024/25.*

*Í viðgerðini er komið í ljósmála at broytta upptøkan er treytað av royndarverkætlanini við broyttum tíma og lærugreinbýti, góðkend av Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Góðkenningin av royndarverkætlanini, ið ikki er í samsvari við góðkenda skúlabygnaðin í kommununi, hevur við sær trupulleikar fyri kommununa og skapar órógv á øðrum skúlum. Tað undrar kommununa at Barna- og útbúgvingarmálaráðið ikki hevur tryggjað sær undirtøku frá kommununi fyri royndarverkætlanina, tá farið verður útum góðkenda skúlabygnaðin.*

*Leiðslan hevur í hesum sambandið átala brotið hjá Barna- og undirvísingarmálaráðnum á skúlabygnaðin. Samstundis hevur leiðslan sagt frá, at kommunan ætlar at rætta hesi viðurskifti soleiðis, at innskrivast kann ikki til breytir í Skúlanum á Fløtum at byrja í 7. flokki skúlaárið 2025/26.*

*Við hesum verður góðtikið, at innskrivingar í 7. flokk á Skúlanum á Fløtum skúlaárið 2024/25 standa við, men at tað ikki verður hildið áfram við sama innskrivingarhátti fyri skúlaárið 2025/26, uttan so at kommunan gevur heimild til tað.*

Leiðslan í Skúlanum ger vart við, at kommunan eigur at gera ein bygnað, ið byggir á støddir, flokkatal og móttøkuárgangir. Ikki ítøkiliga innihaldið í undirvísingini, ið hoyrir undir UVS og BUMR við fólkaskúlalóg, námsætlanum og tíma- og lærugreinabýti, skipan av undirvísingini og játtan til undirvísingina.

Kommunan avgerð ikki, um Skúlin á Fløtum skipar 7 flokk í miðdeild ella í hádeild.
Kommunan avgerð ikki, um skúlin innanfyri karmarnar á fólkaskúlalógini og tilhoyrandi rundskrivum, kunngerðum og námsætlanum skipar sítt virksemi í t.d. rásir.

Tó avgerð kommunan hvussu, men ikki um, skúlin skipar fyri upptøku í rásirnar.

Tá kann kommunan áseta,
1.
at skúlin fylgir verandi mannagongd við innskriving í 7.fl sum er lík innskrivingina í forskúla og 1.flokk; júst sum gjørt var til innskrivingina í 2024

2.
ella um kommunan ynskir, at skúlin fylgir mannagongdini um flyting millum skúlar í kommununi, tá tøk pláss eru innanfyri bygnaðin.
Tann mannagongdin sigur at umsóknir verða viðgjørdar ein og ein eftir dagfesting.

Leiðslan ynskir at skúlastýrið tí heitir á kommununa um at taka málið upp til nýggja viðgerð við hesum grundarlag.

1.
Skúlin á Fløtum er móttøkuskúli fyri skúlabørn av Velbastaðar skúla. Hetta skúlaskiftið er staðfest at vera millum 6 og 7.flokk sambært skúlabygnaðinum hjá Tórshavnar Kommunu.

2.
Skúlastýrið fyri skúlan hevur samstykt at skúlin er skipaður í 5 deildir.

Forskúla - 0.fl,
grunddeild - 1.-3.fl,
miðdeild - 4.-6.fl og
hádeild 7.-9.fl.

Lopfjølina, ið er serligt tilboð til næmingar við skúlaaftran
Gulaskúla, ið er serligt skipað tilboð frá 4-10 flokk.

Skúlin hevur ikki 10.fl., ið smb fólkaskúlalógini eru partur av framhaldsdeild. Í Tórshavnar kommunu er 10.flokkur savnaður í NámX í Eysturskúlanum.
Lopfjølin er staðsett í Margarinfabrikkini og samskipað við tilboðini í Margarinfabrikkini.
Guliskúli er eind fyri seg. Eindin er staðsett í Billugøtu á Argjum.
Restin av skúlanum, forskúlin, grunddeil, miðdeild og hádeild eru í eindini við Hans Andriasargøtu í vesturbýnum.
Harumframt er frítíðarskúli í bygninginum við Hans Andriasar gøtu. Hetta er ikki serliga væl eydnað. Leiðsla skúlans ynskir, at frítíðarskúlatilboðið flytir niðan í Spíran, ið eigur at tillagaður tilsvarandi.

3.
Kommunan skipar fyri upptøku í forskúla og 1.fl eftir økjum sum kommunan hevur ásett.
Næmingtalið í flokkunum er ikki hægri enn 24. Tó ikki hægri enn 22 í 1.fl frá skúlaárinum 25/26 at roknað.
Skúlin býður eftir hetta út tøk pláss innanfyri hendan karmin eftir leiðreglum hjá kommununi.
Hesar leiðreglur siga, at skúlaskiftið í kommununi avgreiðir leiðslan sjálv.
Skúlaskiftið til TK skulu gjøgnum mentamáladeildina, ið fordeilir hesar eftir tøkum plássum og innanhýsis ásetingum.
4.
Samtykkti skúlabygnaðurin hjá kommununi ásetir at:
Tað eru 3 flokkar í hvørjum árgangi í forskúla, grunddeild og miðdeild.
Tað eru 4 flokkar í hvørjum árgangi í hádeild.

Tí heitir skúlastýrið á kommununa um:
A
aftur at góðkenna verandi mannagongd við upptøku í 7.flokk við tí mannagongd sum skúlin hevur gjørt saman við Mentamáladeildini, tá skúlin var móttøkuskúli í 8.flokki eftir gamla bygnaðinum.
B.
Ella staðfesta, at so traðkar hin mannagongdin í verk, ið er innskriving eftir dato, ið er tann, ið vit fóru burtur frá, tá skúlin var móttøkuskúli í 8.flokki, tí hon leggur upp til at innskrivingar í størri mun tá verða gjørdar eftir januar manaða, ið er skeringsdato fyri fyribilsjáttan hjá skúlunum.

Ad. 2
**Foreldraumboð frá Gulaskúla í Skúlastýrið á SAF?**
Mál frá Bjørg Dam um at velja fast umboð fyri Gulaskúla.
Gjøgnumgongd av innkomnum máli og skrivi frá Tórshavnar Kommunu um málið.

Niðurstøðan er: at skúlastýrið stillar 6 fólk upp á felags lista harav ein umboðar Gulaskúla. Allar deildir eru umboðaðar á uppstillingarlistanum. Umboðini mugu veljast eftir vanligum vali.

Tað er sjálvandi eisini møguligt eftir reglunum at onnur gera listar og stilla upp.

Hetta skúlastýrið sær tað tó sum sína uppgávu at gera ein lista við minst einum umboði fyri Gulaskúla og við minst 6 umboðum tilsamans. Tí tá hava fólk eitt veruligt val og valevni at velja ímillum.

Ad. 3
**Uppstillingarfundur**
10 oktober 19
Skrá: Formansfrágreiðing
í uppskoti
Høgni Mohr sum (positivur provokatør)
Annika Helgadóttir (sálarheilsuperspektiv, hvat er munagott hjá einum umboði at taka við)
Eydna Skaale (Sum kjakari og retorikari)
Regin tosar við tey

Ad. 4
**Ymiskt**
A: Gongufund
Foreldraumboðið í stýrinum meta um árliga matstovuvitjanina. Hetta er hungalig løta har ramman um fundin er bleytari. Tí skjóta tey upp, at vit eisin gera ein annan fund í aðrari rammuseting.
Snorri skjýtur upp at gera ein fundargongutúr. Henn nevnir dømi um at siglt út í Borðuna og gingið heimaftu eftir Nólsoynni og farið aftur við Teistanum/Ternuni.
B:
Foreldraumboðini ynskja at rørsla og undirvísing uttanfyri klassiskar karmar er ein náttúrligur partur av undirvísingini. Tey rósa nógvum ymiskum átøkum og hava eisini dømi um undirvísing, ið ikki var so væl eydnað. Prátað verður um evnið og skúlastýrið ynskir framhaldandi at undirvísing uttanfyri klassisku karmarnar verður ein eins náttúrligur partur av skúlanum framhaldandi og sær eisini fegið nýggj átøk har millum annað virkin oktober er eitt gott høvi at flætta samfelagið, rørslu, øðrvísi karmar og skúlan saman.

Ad. 5
**Áseta næsta fund**
Hósdagin 23. oktober 2024 kl 16-17